# Várkonsert í Klaksvík

**Hóskvøldið verður skipað fyri forkunnugari várkonsert í Skúlanum við Ósánna í Klaksvík**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*



**Klaksvík:** Hóskvøldið 02.05.02 verður skipað fyri eini várkonsert í Klaksvík, har 17 Sangarar, kvinnukórið Suð, Skúlasangkórið, Barnasangskúlin og klavernæmingar fara at luttaka.

Skráin verður fjølbroytt við fosturlandssangum, kendum Negro Spirituals, afrikonskum sangum og solo sangum, umframt at solo-, fer- og sekshent klaverspæl eisini verður á skránni.

Frá fyrireikaunum frætta vit, at millum annað sangirnir ”Sound of Music” og ”Komm, holder Lenz” úr Árstíðunum hjá Joseph Haydn verða at hoyra.

Við hesi konsert enda Skúlasangkórið og Barnasangskúlin teirra fyrsta ár.

17 Sangarar skulu á eina konsertferð til Svøríkis og Danmarkar seinni í mánaðinum, og fara tey at framføra eitt úrval av hesi konsertskrá.

Umframt alt hetta verður eisini felagssangur á skránni.

Konsertin verður í Skúlanum við Ósánna í Klaksvík hóskvøldið klokkan 20.00.

Atgongumerki verða at fáa við dyrnar.

## ”Open by Night” í Klaksvík

**Klaksvíkar Handilsfelag skipar komandi fríggjakvøld fyri einum ”Open by Night”-kvøldið í Klaksvík**

HANDILSLÍV
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Allir handlar í felagnum eru við í hesum tiltakinum, og fara teir at hava opið líka til klokkan 23.00 fríggjakvøldið.

Hetta við at hava ”Open by Night” er nú vorðið eitt afturvendadi tiltak, og hevur tað verið sera væl móttikið av klaksvíkingum og norðoyingum annars.

Í samband við tiltakið fríggjakvøldið verður ymiskt spennandi á skránni, millum annað kunnu vit nevna eina uttandura mótaframsýning og sjálvandi hava handlarnir eisini fleiri tilboð at bjóða viðskiftafólkunum.

Harumframt fer svimjihøllin í Klaksvík, sum júst er vorðin nýumvæld, at hava opið fyri øllum til klokkan 22.00.

Nevndin í Klaksvíkar Handilsfelag hevur annars fyri stuttum skipað seg av nýggjum, og sær í dag soleiðis út:
Jógvan Jacobsen, formaður
Harley Bertholdsen, næstformaður
Jóhanna Christiansen, kassameistari
Beinta Klakkstein, skrivari
Sámal Eyðfinn Akursmørk, nevndarlimur
Sørin Jacobsen, tiltakslimur
Magnus Arge, tiltakslimur












